

*Fólk til gongu og bilar hvørt um annað. Ferðslutrygdin á nýggju ferðsjuleguni hjá Smyrli í Suðuroy, er so út av lagi vánalig, at tey, sum taka ímóti Smyrli, tora mangan ikki at hyggja, tá ið fólk fer í land av Smyrli*

# Viðhvørt má eg bara halda fyri eyguni

**- Ruðuleikin so stórur, at viðhvørt tori eg ikki at hyggja út. Ferðsluviðurskiftini á nýggju ferjuleguni hjá Smyrli í Suðuroy eru heilt út av lagi vánalig, men tað sær út til, at vit skulu bíða til vanlukkan er hend, sigur Jonny Dimon á kunningarstovuni á ferjuleguni**

FERÐSLUTRYGD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hvønn dag, eg fari til arbeiðis, er tað við ynskinum um, at bara tað ikki verður í dag, at ein vanlukka hendir.

Jonny Dimon arbeiðir í kunningarstovuni á nýggju ferjuleguni hjá Smyrli á Krambatanga á Trongisvágsfirði.

Sostatt er hon hon hvønn einasta dag til arbeiðis og tekur ímóti Smyrli, tá ið hann kemur úr Havnini.

Men hon er púra forfard um tann ruðuleika, sum er av ferðsluni á nýggju ferjuleguni hjá suðuroyingum.

- Har er so stórur ruðuleiki, at tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn einn vanlukka stendst av, sigur hon.

Hon sigur, at viðhvørt er ferðslan og hættislig, at hon hon torir ikki at hyggja út.

- Tað er hvørja ferð tá ið Smyril kemur, at vit ganga við hjartanum í hálsinum um, hvat kann henda í ferðsluni á ferjuleguni. Men tað er serliga leygarmorgnar og sunnumorgnar tá ið nógv børn ferðast við Smyrli í ítróttarørindum, at vit øtast um støðuna.

Eitt gott dømi var nú leygardagin, tá ið nógv børn komu suður at íðka ítrótt.

- Eg má bara siga, at eg mátti bara halda fyri eyguni, tí eg ivaðist ikki í, at onkur fór at liggja eftir á.

Hon sigur, at tann stóri trupulleikin, at bilar og ferðafólk eru blandað ov nógv saman.

- Bilar og fólk, sum koma í land av Smyrli, bussar, leigubilar og bilar, sum koma eftir fólki er alt blandað saman, hvørt um annað.

Fólk og bilar hvørt um annað

- Stóri trupulleikin er sjálvandi fólkið, sum kemur í land av Smyrli, tí tey eru tann veikasti parturin í ferðsluni. Men fyri at sleppa av ferjuleguni, skulu tey mangan tvørturum vegin, har bilarnir koyra í land av Smyrli.

Samstundis standa bussar hjá Bygdaleiðum, leigubussar og aðrir bilar beint við, har sum ferðafólkið skal ganga tvørturum.

- Ein trupulleiki er, at tað kemur fyri, at leigubussar stilla seg á plássini hjá Bygdaleiðum so at bussarnir hjá Bygdaleiðum mugu stilla eg onkra aðrastaðni.

-Tað er eisini so illa merkt, at tað kemur fyri, at bilar parkera á vegbreytini.

Jonny Dimon sigur, at tað skerst ikki burtur, at tey, sum koyra í land av Smyrli mangan skunda sær og tá ið útsýnið hjá gangandi ferðafólkið mangan er skert av stórum bilum, er tað eitt undur, at ongin vanlukka er hend enn.

Kunnu ikki bíða eftir vanlukkuni

Hon sigur, at hon er hvønn dag á ferjuleguni og sostatt sær hon, hvussu skilið er.

Tað einasta rætta er at leiða bilarnar, sum koma í land av Smyrli, longur niðan á ferjuleguna so at teir ikki komu íbland við fólk, sum er til gongu.

- Vit hava gjørt vart við óskilið fleiri ferðir, men tað hendir onki.

- Tað einasta, sum er hent, er, at Landsverk hevur sett nakrar betongstabbar upp og spent snórar ímillum so at ferjulegan nú líkist eini gokart-breyt.

Eftir hennara tykki er støðan heilt álvarslig og tað er bara ein spurningur um tíð, áðrenn ein vanlukka hendir.

- Eg havi spurt um meiningin er at bíða til ein vanlukka er hend. Og eg havi eisini spurt, hvør skal hava skyldina, tá ið vanlukkan er hend.

Hon heldur, at okkurt eigur at verða gjørt við støðuna beinanvegin.

- Vit kunnu ikki bíða til tað er ov seint, leggur hon afturat.

Poul Johannus Poulsen koyrir buss fyri Bygdaleiðir so hann kennir væl umstøðurnar á ferjuleguni.

Hann sigur, at skal hann bara hugsa um Bygdaleiðir, eru teir ikki so nógv nervaðir av ferðsluni.

Kortini kemur tað fyri, at aðrir bilar standa á plássunum hjá Bygdaleiðum og tað ger fortreð.

Men hann ásannar, at sum heild eru viðurskiftini ikki góð.

- Tað er ørskapur at leggja vegin, sum bilarnir, ið koma íland av Smyrli, skulu koyra eftir, beint har fólk til gongu kemur út av farstøðini. Bilarnir skuldu koyrt longri uppi so at bilar og ferðafólk varð skilt sundur mest møguligt, sigur bussførarin hjá Bygdaleiðum.

Tað er Landsverk, sum hevur ábyrgdina at ferðslutrygdini á økinum.

Oyvindur Brimnes, stjóri á Landsverki sigur, at arbeitt hevur verið við málinum. Men nú summarferian hevur verið, veit hann ikki akkurát, hvussu málið liggur og tí hevur hann ongar viðmerkingar beint nú

## 63 hval løgdu beinini í Hvalba

**Leygarkvøldið varð grindin hildin til í Hvalba. Býtt varð til syðru helvt av Suðuroynni**

GRIND

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um áttatíðina fríggjakvøldið var drápið liðugt. 63 hval høvdu løgdu beinini, og var hetta nakað meira enn mett. Seðlarnir komu út klokkan trý leygarnáttina.

Tilsamans var talan um 264 skinn.

Hóast hvalirnir løgdu beinini í Hvalba, so varð býtt til syðru helvt av Suðuroynni. Grindabýtið í Suðuroynni hevur ofta verið havt á mannamunni sum sjáldsama rættvíst, og ikki sørt øðrvísi enn norðanfjørðs.

Drápspartar eru ongir, men býtt verður alt eftir, hvar í oynni mest tørvur er.

Hvalbingar og onnur fingu grind fyri ikki so langari tíð síðani, og tí varð hesaferð býtt til syðru helvt av Suðuroynni, hóast hvalirnir løgdu beinini í norðaru helvt.